LM-137/2020

Dytgrskjal 7

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG

Fiskimálaráðið
fisk@fisk.fo

Tórshavn 31. marts 2021

Okkara tilv./Our ref.:
4989-3932/Niels/Fxroya-FAG-B-V
Tykkara tilv./Your ref.:

Viðmerkingar til uppskot um broyting í sjófeingislógini

Fiskimálaráðið hevur á heimasíðu sínari lagt út uppskot um broyting í sjófeingislógini í almenna hoyring.

Føroya Arbeiðsgevarafelag (FAG) skal viðmerkja, at hoyringsfreistin einans er 1 vika, og at talan er um eina týðandi broyting í lógini. FAG heldur, at Fiskimálaráðið eigur at geva sær betri stundir at fyrireika slíkar broytingar, so tað kann tryggjast at øll fáa møguleika at seta seg inn í og viðmerkja málið.

Annars hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag hesar viðmerkingar:

- Sum útgangsstøði heldur FAG, at kapping á jøvnum føti er góð fyri samfelagið
- Tó er eisini greitt, at um aðrar tjóðir hava verjutiltøk mótvegis okkara vinnu, so eigur at verða mett, hvussu opnar dyrnar skulu vera á okkara litla marknaði. Tað sæst ikki í viðmerkingunum til lógina, um nakrar metingar eru gjørdar av hesum viðurskiftum, tað verður einans skrivað, at orsøkin til lógaruppskotið hevur samband við uppskotið til løgtingslóg um veiðigjøld, sum skulu krevjast inn sambært øðrum lógaruppskoti.
- FAG skal í hesum sambandi enn einaferð vísa á týdningin fyri vinnuna av, at almennu karmarnir eru forútsiguligir og rímuliga stabilir. Verandi sjófeingislóg, sum ásetur, at fiskur sum útgangsstøði skal landast í Føroyum, er frá 2019, og nú bert 2 ár seinni ætlar sama samgonga so at gera tað møguligt at landa part av veiðini uttanlands. Uttan mun til hvat man annars heldur um uppskotið, gera vinnufyritøkur iløgur og taka avgerðir grundað á teir karmarnar, sum útlit eru til komandi árini. Um tað javnan verða gjørdar týðandi broytingar við stuttum skotbrái í hesum karmum, gerst tað sera trupult at reka lønandi vinnu í hesum landi.

Vinarliga
Føroya Arbeiðsgevarafelag

Marita Rasmussen

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo